Losjan Støt Viljen
100 ár

Bókin kastar ljós á hendingar og viðurskifti í farnu øld. M.a. um fyrstu fólkaatkvøðuna í Føroyum, tá konufólk sleppur at atkvøða.




Virðismiklar, siðsøguligar myndir og lestur

Fæst í bókabúðunum
kr. 325,-

Forlagið Mál & Mentan

# Nyrup heldur at kósin var røtt


*Poul Nyrup Rasmussen*

**Fyrrverandi danski forsætisráðharrin heldur, at hann í síni tíð beindi føroyska búskapin aftur á beint**

NYRUP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað leikaði hart á í sambandinum millum Føroyar og Danmark í tíðini, tá ið Poul Nyrup Rasmussen var forsætisráðharri í Danmark. Bankakreppa og fullveldissamráðingar settu dám á viðurskiftini, sum ofta vóru sera trupul.

Mikumorgunin segði Poul Nyrup Rasmussen vil morgunsendingina hjá Rás 2, at kósin, sum varð vald í sambandi við búskaparkreppuna, var tann rætta.

– Eg eri í løtuni í holt við at skriva triðja bindið av mínum endurminngunum, og tað fer millum annað at snúgva seg um mítt samband við føroyingar og føroyska samfelagið.

– Tá ið eg hugsi aftur um mítt samstarv við føroyingar frá 1993 til 2001, so havi eg tvær yvirskriftir. Onnur yvirskriftin er, at tað var ikki nøkur lætt tíð, tí Føroyar vóru í búskaparligari kreppu. Hin yvirskriftin er, at vit valdu eina rætta kós.

– Tað var týdningarmikið, at vit funnu eina leið burtur úr kreppuni, men samstundis hevði tað týdning, at føroyska fólkið sjálvt varð við til at velja hesa leið, og tað havi eg altíð virt. Jú, tað vóru diskussiónir um hetta, men soleiðis er nú nú einaferð, tá ið tað eru kreppur í okkara samfeløgum. Tá skal man kjakast, og tað gjørdu vit eisini tá, segði Poul Nyrup Rasmussen.

Eitt hús – tríggir miðlar



Starvslýsing – tíðindafólk

**Eitt blað hvønn dag**, leypandi dagføringar av størsta tíðindaportali í landinum og útvarp.Til alsamt vaksandi framleiðsluna hjá Miðlahúsinum í Vágsbotni søkja vit nú eftir tíðindafólki.

Uppgávan hjá tær verður í fyrsta lagi at virka sum leiðari á webøkinum, har vit í løtuni røkja portal.fo, sportal.fo og planet.fo umframt netúgávuna av Sosialinum. At skriva tíðindi til blað og net er partur av hesum arbeiði. Hartil verður tú partur av toyminum, ið skal samskipa tíðindaflutningin hjá teimum trimum miðlapallunum, sum vit í løtuni fevna um.

Rætti umsøkjarin hevur góð evni at skriva og sum samskipari.

Útbúgving og royndir innan blaðmannaøkið eru avgjørdir fyrimunir, men verða tó ikki sett sum treyt. Og vit rokna við, at tú kanst byrja í starvinum í seinasta lagi tann 1. februar í 2008.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 20. desember senda umsókn til:

***Sosialurin***
***Att: Jan Müller***
***Postsmoga 76***
***FO-110 Tórshavn***

Áhugað kunnu sjálvandi eisini frætta meira um starvið við at seta seg í samband við Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á tlf 341800 ella á teldupposti jan@sosialurin.fo

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir í dag um tríggjar miðlapallar. Blaðútgávu, tíðindaflutning á netinum og útvarp. Tilsamans starvast um 35 fólk í samtakinum.

Sosialurin Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

TALENT®

*Spælið har øll kunnu vera við!*



**Spælið fæst her:**
- **Statoil** *støðunum kring landið*
- **INN**, *Klaksvík*
- **Alfa**, *Klaksvík*
- **INN**, *Norðskála*
- **INN** *við landavegin, Tórshavn*
- **Rit og Rák** *í SMS*
- **H.N. Jacobsens bókahandil**, *Vaglinum, Tórshavn*
- **Bókabúðin**, *Runavík*
- **Hjá Bassa,** *Fuglafjørður*
- **Hjalmar Jacobsen bókhandil**, *Tórshavn*
- **Karl Jespersen** *á Tvøroyri*
- **Berglon**, *Saltangará*
- **Elding**, *Miðlon*

**TALENT er ætlað øllum gávuríkum familjum**

Talent er eitt hugnaligt og lærurikt spæl, har hin klóki, hin snildi og hin hepni loysa ymiskar uppgávur og svara góðum spurningum. Kveikt av bíbliskum vísdómi skulu talentirnar ikki goymast burtur, men koma til sín fulla rætt.

Í nýggja føroyska brettspælinum kunnu øll tey vera við, sum ikki eru bangin fyri at læra okkurt nýtt ella svara okkurt býtt.



**Tryggja tær TALENT** *- og fá spælið borið til dyrnar:*
Flyt kr. 695, - á konto 9865 - 1034701 og viðmerk navn og bústað tygara. Allar bíleggingar áðrenn 03. desember verða sendar kring landið í viku 50.

*JÓLAGÁVAN TIL ALLA FAMILJUNA*